**Trygdarmiðstøðin**
*Bøgøta 38*
*Postsmoga 297*
*Fo-700 Klaksvík Tlf +298 455882*
*Fax +298 457197*
*www.seasafe.fo*

## Skeiðlærari til Trygdarmiðstøðina

Trygdarmiðstøðin søkir eftir fólki at undirvísa í trygd á sjónum at byrja skjótast til ber, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

**Starvsinnihald:**

- Undirvísa í trygd á sjónum. Undirvísingin fevnir um bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar – og eldsløkkiútgerð v.m.
- Vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnunni.
- Vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði herundir ISO-skipanina á venjingarstøðini og aðrar fyrifallandi uppgávur.

**Førleikakrøv:**
*Umsøkjari skal hava*

- Lokið prógv sum navigatørur ella sum maskinmeistari við 3 ára útbúgving, ella hava drúgvar starvsroyndir við neyðugari eftirútbúgving innan trygd umborð á skipum, boripallum ella flogferðslu, ið kunnu javnsetast við tað.
- Fyrimunur er, um tann ið søkir starvið, hevur royndir í undirvísing frá t.d. sjóvinnu, frálanda ella loftferðslu.
- Kavaraprógv ella aldur og heilsu til at taka prógv sum kavari
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevni

Tann, ið settur verður, skal vera til reiðar at taka ymiskar útbúgvingar og eftirútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanarviðurskiftir :**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaraðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini.

Tænastustaðurin er í løtuni í Klaksvík.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknarfreistin er 27. september 2010 kl 16.00

Trygdarmiðstøðin
Bøgøta 38
Postsmoga 297
Fo-700 Klaksvík Tlf +298 455882 Fax +298 457197
www.seasafe.fo

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skullu sendast til:

**Trygdarmiðstøðin**
Postsmoga 297 · FO 700 Klaksvík · Att: Skeiðlærari.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marius Magnusson leiðara á tlf 455882
ella umvegis teldupost;
marius.magnusson@seasafe.fo

Lýsingin sæst eisini á :
www.seasafe.fo og www.fisk.fo



## Hús í Tórshavn til sølu

Vegna konkursbúgv verður ognin Rasmusargøta 4, 100 Tórshavn lýst til sølu. Talan er um matr. nr. 1015ø, Tórshavn, grundøkið er 292 m² til víddar við ástandandi sethúsum. Í sethúsunum eru 2 íbúðir umframt handilshøli í kjallarahæddini.

Verður seld um hóskandi boð fæst. Áhugaði kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge á tlf. 311744. Nærri kunning á heimasíðuni www.klett.fo

**KLETT ADVOKATAR**
**JULIANNA KLETT · JÓHAN J. LAMHAUGE**

Bringsnagøta 21 · Boks 62 · 110 Tórshavn
**www.klett.fo**

Sosialurin 341800

## Ársaðalfundur í Camping.fo

**Ársaðalfundur felagsins verður í SÍF húsinum í Sandavági leygardagin 2. oktober kl. 13.30**

**Camping.fo**

## Timburmaður

**Søkt veður eftir timburmanni, til arbeiði í Havn, at byrja skjótast tilber**

**Sp/f Støðla**
**tlf. 595140**

Sosialurin 341800

**Reingerðarfólk til SEV**
Eitt starv sum reingerðarfólk á skrivstovuni hjá SEV á Landavegnum í Havn er leyst at søkja til setan skjótast tilber.

SEV
**Sí www.sev.fo.**

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðul til ungan mann í Tórshavn

Stuðulstænastan søkjir eftir stuðli at arbeiða umleið 15 tímar um vikuna, hjá fjølbrekaðum heimabúgvandi, ungum manni í Tórshavn.

Starvið verður at seta sum skjótast

**Arbeiðsuppgávur**
At stuðla og vera um mannin eftir loknan arbeiðsdag, fara vi honum til ymisk tiltøk og soleiðis stuðla honum í at hava ein innihaldsríkan gerandisdag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast frá:
Sofíu Jespersen, samskipara - tlf 764120

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Stuðulstænastan
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 1. oktober 2010**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerver.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

**NÆRVERKIÐ**
www.naerverk.fo

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

klipp og goym

## BRÚKT

**FRAMLEIÐSLUTÓL, MASKINUR OG LUTIR**

til alla vinnu og til alla nýtslu hava vit brúka útgerð, maskinur og eykalutir frá óteljandi uppboðssølum - á lagri í Danmark - snøgt sagt alt møguligt og ómøguligt til spottprísir - keyp bíligt brúkt og ikki nýtt og dýrt. Send okkum fyrispurning um hvat tær nýtist á føroyskum, donskum ella enskum á teldupostadr.: *2nd-hand@mail.dk*, og vit venda aftur.

Lesið
**Sosialin**
-tað loysir seg

## Selja bilin?

– set hann í Sosialin!

**Ring og fá ein prís!**



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

**Sosialurin**
– blaðið øll lesa!